# Reglugerð fyri bátadráttin í Leirvík

§ 1 Reglugerðin er galdandi fyri bátadráttin í Leirvík.

§ 2 Endamálið við bátadráttinum er til vanligt viðlíkahald, s.s. botnreins og at mála bátin.

§ 3 Sami bátur kann í mesta lagi verða á bátavogninum í 2 samanhangandi døgn.

§ 4 Kostnaður fyri at taka bátin upp og fyri 1. døgnið er kr. 1.500,00 v/mvg. Næsta døgnið er kostnaðurin kr. 250,00 v/mvg. Gjaldast skal frammanundan.

§ 5 Kostnaður fyri bát minni enn eitt 6 mannafar er kr. 500,00 v/mvg og næsta døgnið kr. 250,00 v/mvg. Gjaldast skal frammanundan. Annars skal báturin á sjógv aftur skjótast tilber.

§ 6 Er talan um størri umvælingar, so skal báturin av bátavogninum eftir 2 døgn.

§ 7 Hevur bátaeigari eftirstøðu til bátspláss o.l., skal eftirstøðan gjaldast, áðrenn báturin sleppur á bátavognin.

§8 Bátaeigarin hevur treytaleyst ábyrgdina av egnum báti, tá báturin verður tikin upp, meðan báturin er á vogninum og tá báturin fer á sjógv.

§ 9 Bátaeigarar í Eysturkommunu hava fyrsta rætt til nýtslu av bátadráttinum.

§ 10 Reglugerðin kemur í gildið tann 30. august 2020.

Eysturkommuna